# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Seytjandi partur**

Ezekiel profetur, hin triði av teimum fýra stóru profetunum, fekk veldigar opinberingar. Í fyrsta kapitli sigur hann frá, hvussu hann sá Gud sita á einum hásæti. Gud sat uppi yvir einum hvølvi, og undir hvølvinum vóru fýra verur og hjól full av eygum, eldur osfr.

Í aðru Mósebók 33, 18 lesa vit, at Móses vildi síggja dýrd Harrans. Hann fekk loyvi at síggja Gud uppá bakið, men andlit mítt kann einki menniskja síggja, segði Harrin. Her hjá Ezekiel síggja vit tað sama. Tað sum Ezekiel sær, er óklárt. Lat okkum hyggja eftir versi 26 og 27 í 1. kapitli:

"Uppi yvir hvølvinum, ið var yvir høvdum teirra, var nakað, ið sá út til at vera av safirsteini, og sum líktist hásæti; og uppi á hesum, ið líktist hásæti, var Ein, sum av útsjónd líktist menniskja.

Eg sá nakað, ið líktist blonkum málmi - sum eld at síggja - við ringi av ljósi rundanum, frá har sum lendar Hansara tyktust at vera og uppeftir. Men frá har sum lendar Hansara tyktust at vera og niðureftir, sá eg nakað, ið sá út sum eldur, og rundan um Hann var bjart skin."

Í fjórða parti skrivaði eg um, tá ið Gud kom niður til ísraelsmenn at búgva hjá teimum, og vit lesa í kapitli 40,34 í 1. Mósebók, at dýrd Harrans fylti tabernaklið. Her í teimum fyrstu kapitlunum hjá Ezekiel, síggja vit dýrd Harrans flyta seg og fara úr templinum og burtur. Ein ræðulig tíð hjá judafólki. Eini 5-6 ár seinni fall judaríki, og fólkið varð herleitt til Bábel. Alt grunda á ólýdni fólksins móti orði Harrans. Sjeyti ár seinri slapp ein leivd heimaftur, men nú var Ísrael ein landspartur av heimsríkjunum. Síðani gingu eini fýrahundrað ár ella so, tá koma vit fram til Jesu tíð. Jødarnir vrakaðu sín Messias, sum vit vita, og ár sjeyti eftir Kristi føðing gekk landsparturin til grundar. Tað seinra templið var sorlað sundur av herinum hjá Titus, og ísraelsfólk spjatt út um allan heimin, júst sum profetarnir høvdu spátt skuldi ganga.

Hevur hetta nakað at læra okkum. Jú vissuliga. Eg havi fyrr nevnt hetta, sum stendur hjá Jeremiasi, at Harrin sigur í kap.25,29: Staðin, ið kallaður er við navni mínum, læt eg jú vanlukkuna koma yvir fyrst – og so skuldu tit sloppið! Nei.

Nei, tú fert ikki at sleppa undan, um tú vrakar orð Harrans og ikki vilt taka ímóti Jesusi sum tínum frelsara.

Her hava vit aftur sæð eitt dømi um, hvussu skriftirnar eru komnar til okkara. Hvussu trúvert orðið er og til fulnar vert at verða fagnað, sum Paulus sigur. Hetta hevur verið so sjálvsagt at góðtaka fyri føroyingar, bíblian hevur verið hátt vird í tann máta, at ikki hevur verið sagt henni ímóti, hóast at hon als ikki hevur verið fylgd mangan. Syndin hevur dominerað ímillum okkara, men fólk hevur góðtikið, at tað er skeivt tey gera. Tað kemur av, at Bíblian hevur verið góðtikin, sum tann høgi status, sum hon er. Men nú er vent í holuni í Føroyum. Fólk rópa upp og krevja sín rætt at liva, sum teimum lystir beint ímóti greiðu boðum Guds, bæði undir tí fyrra sáttmálanum, lógini, og tí seinra, náðini í Jesusi Kristi. Avleiðingarnar eru øðiligar. Mørkini verða flutt, soleiðis at forfedrar okkara høvdu vent sær í grøvini, um tað bar til. Og hugsa til dømis um okkurt, sum kom fram í ungdómstinginum her fyri. Skammiligt. Og okkara háttvirdu formenn í tinginum sita á hesum høga palli og nikka til, sum um man tosaði um fisk. Eingin mótmælir. Tað er kanska ikki so nemt. Hesin skúlaungdómur er kanska førdur heilt bak ljósið við bara at læra, at likamið kann gerast sjúkt, men ikki hevur verið dentur lagdur á, hvussu farligt tað er fyri sálina at kasta seg út í ólevna og synd, hvussu neyðugt tað er at fylgja teimum gomlu markaskjølunum, sum aftur eru bygd á tær heiløgu skriftirnar.

Avleiðingarnar av hesum aftur verða brotin hjúnaløg, børn fødd uttan fyri hjúnalag, harav ein partur má drepast í móðurlívi, meina summi.

Føroyingar vendi við. Sum nú er gongur beint ímóti eggini.

Á ættarlið! Gev orði Harrans gætur. Jeremias 2,31.

**Framhald**

# Kjakmentan og trúvirði

A. GUTTORMUR DJURHUUS



Í Sosialinum hin 17. mars í ár hevur Símun Absalonsen drúgva grein um kjakmentanina, sum hann heldur at vera í kreppu. Í greinini rør Símun Absalonsen framundir, at hann sjálvur heldur enn Hans Andrias Sølvará hevði uppiborið at fingið heiðurslønina fyri heiðurligt kjak. Eg haldi so við, og presturin Olofsson er eisini av somu áskoðan. Í hvussu so er skuldi hann fingið heiðursløn fyri treysti og treiskni.

Í greinini sigur hann m. a.: "At Flew hevur svikið sína gomlu "trúgv" hevur fingið øði í Dawkins, sum metir, at Flew kanska er vorðin senilur". Í kelduávísingini undir greinini verður víst til "The God Delusion" av Richard Dawkins. Ikki dugi eg at síggja, at Richard Dawkins nakrastaðni í tí bókini sigur, at Flew er vorðin senilur, so endurgevingin má koma onkra aðra staðni frá, tí ikki fái eg meg at trúgva, at ein gudsmaður, sum vil hække kjakmentanarstøðið, endurgevur skeivt. Í hvussu so er ikki við vilja.

Áhugavert hevði tí verið at fingið at vita, hvaðani endurgevingin stavar. Ella eru tað míni viknandi eygu, sum hava svikið meg?

# Einligir pensjónistar sita køld í húsum sínum

DAGNY PETERSEN
Sørvágur

Til okkara kosnu menn og kvinnur!
Nær fara tit at taka upp til viðgerðar okkum pensjónistar á ein virðiligan hátt?
Vit hava ikki ráð at koyra hitan frá, bæði tí at oljan er dýr, og so hattar dýra oljuavgjaldið. Av tí at pensjónin ikki røkkur til, hava vit tørv á at oljugjaldið verður tikið burtur, og mvg'ið eisini.

# Fiskimannafelagið ikki sovið í tímanum

ÓLI JACOBSEN



Ætlaði ikki at leggja meg út í leikin hjá Jan Højgaard við Carlton, har myndin kanska ikki er so hvørt-hvít, sum tað verður sett upp. Men tá hann fer at seta høvd uppá tað, sum er farið fram í FF undan hansara tíð, skal gerast ein viðmerking.

Í Rás 2 hevur hann sagt, at FF hevur sovið í tímanum viðvíkjandi sáttmálan hjá nótaskipum.

**Hevur ongan førleika í sáttmálaspurningum**

Tað skal fyrst sigast, at Jan Højgaard ikki hevur nakran sum helst førleika til at gera nakra sum helst meting um sáttmálagerð hjá nøkrum.

FF hevur nú samráðst um sáttmála í 96 ár. Seinastu samráðingar hava verið tær fyrstu, har formaðurin ikki hevur verið førur fyri at samráðast við mótpartin uttan hjálp frá einum fiskimannafelagnum púra óviðkomandi persóni, hóatst alt reyp undan valinum um tað, sum hann skuldu fáa framt. Meira ússaligt kann tað ikki vera.

Dugnaloysið hjá Jan Højgaard kom júst til sjóndar við úrslitinum av hesum kaotisku samráðingum, har fiskimenn vóru í verkfalli í 18 dagar fyri eitt úrslit, sum einhvør annar formaður hevði klárað uttan verkfall. Eitt verkfall sum kostaði fiskimonnum milliónir.

Málið við Carlton er ein endurtøka av hesum, har fiskimenn nú hava mist stóra inntøku í bestu tíð á fjórðu viku. Men Jan Højgaard hevur eisini sagt, at nú skuldi hann hava sítt ígjøgnum uttan mun til kostnaðin eisini hjá fiskimonnum!

Annars er nótaskipasáttmálin eitt gott dømi um, hvussu tað ber til at gera ein sáttmála, sum hevur givið fiskimonnum nógv tær bestu inntøkurnar hjá vanligum løntakarum í landinum. At reiðarapartúrin eisini hevur havt vinning, hevur havt til úrslit, at somu fiskimenn hava og fáa millum mest framkomnu arbeiðspláss í heiminum.

**Jan Højgaard roynir at skaða fiskimenn**

Tað er greitt, at fyri hvønn dag verður fiskimannafelagið sett aftur í tíðina. Tað vísir seg, at Jan Højgaard við sínum skerda førleika enntá beinleiðis roynir at skaða áhugamálini hjá fiskimonnum. Hetta er millum annað gjørt við fleiri ferðir at krevja beinleiðis skattahækking fyri fiskimannainntøkur. Fekk hann sín vilja høvdu fiskimenn komið at gjalda leysliga mett 10 mill. krónur meira í skatti enn við galdandi skattalóg. Slík roynd at skaða egnar limir er neyvan sæð fyrr í nøkrum fakfelag.

Frágreiðing um verandi støðu í FF kann eisini fáast í teirri fyri Jan Højgaard sera avdúkandi ársfrágreiðingini, hann legði fram á seinasta landsfundi hjá FF. Stórur partur av hesi frágreiðing verður nýtt til at gera fiskimenn til nøkur ólukkudýr, sum verða hataður av restina av samfelagnum, og hvørs viðurskifti verða sammett við fólkið í Burma, sum líðir undir eitt tað harðrendasta stýri í heiminum!

Úrslitið av einum slíkum hugburði er og verður hareftir.

Lesið Sosialin - so eru tit við